# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fúti og dómari móti russum

Herfyri fall dómur í máli, har russiskir fiskimenn vórðu dømdir fongsulsrevsing og útvísing. Teir høvdu stolið stolið ymsar vørur í handlum fyri nakrar túsund krónur, men har so gott sum alt kom afturíaftur.

Sjálvandi góðtaka vit ikki tjóvarí, og sjálvandi skulu slík lógarbrot revsast.

Men tá spurningurin kemur til mannagongdir, málsviðgerðir, ákærur og sjálva revsingina, so eru helst fleiri meiningar. Og tað gav eisini at bíta henda dagin í rættinum, har annar av verjunum hjá ungu russum varð rættiliga bersøgin og opinskáraður. Sambært rættarreferenti okkara segði hann: -Viðferðin, sum hesir menninir fáa, er í andsøgn við, hvussu fittir føroyingar eru á jólum, tá ið fólk fara umborð á russisku skipini at bera teimum mat. Vit sóla okkum allan desember mánað í góðsku segði advokaturin, sum helt, at menninir áttu at sloppið við eini lítlari bót. At krevja fongsul helt hann vera heilt vitleyst, tí teir høvdu sitið varðhaldsfongslaðir og eisini helt hann hetta lógarbrot verða ov lítið til at útvísa menninar fyri.

Hesum kunnu vit ikki vera meira samd í. Nú er tað ikki vanlig siðvenja, at ivi verður sáddur yvir feldar dómar. Vit halda tað tó vera talan um eitt rættiliga prinsipielt mál, har eitt danskt politi- og dómsvald í Føroyum eftir okkara tykki yvirkriminaliserar russiskar fiskimenn í Føroyum. Dómurin og viðferðin hesir hava fingið er út um alt mark. Fyri hetta sera avmarkaða lógarbrot eru teir stemplaðir fyri restina av lívinum og eingin veit, hvat bíðar teimum í heimlandinum.

Eiga ein fúti og ein dómari ikki eisini at stinga fingurin í jørðina í slíkum máli. Hvønn rætt hava teir til at viðgera slíkt smámál, sum var talan um stóran kriminalitet. Eiga teir ikki eisini at hava í huganum relatiónir millum samstarvstjóðir, tá teir fara so langt í einum so lítlum máli! Eiga teir ikki eisini at taka atlit fyri umstøðunum hjá hesum ungu monnum, sum eru langt heimanífrá. Vit verja ikki tjóvarí, men tað má vera uppgávan hjá ákæru- og dómsvaldinum her á landi eisini at hava proportiónirnar í huganum, tá slík mál verða viðgjørd. Er tað ikki fullkomin proportións "forvrængning", tá man yvirdramatiserar slíkt mál, sum jú kundi verið avgreitt skjótt og einfalt við eini bót!

Høvdu danir ella norðbúgvar fingið líknandi viðferð í slíkum máli!

Vit eiga øll at troyta karmarnar í demokratiinum og eiga tí heldur ikki uttan víðari at góðtaka alt tað, sum ákæruvaldið kemur við. Lógir skulu fylgjast, men hví kunnu tulkingar og útleggingar av lógargreinum ikki eisini koma hesum russum til góða við einum linum dómi heldur enn landsburturvísan og fongsul, atlit, sum rætturin fyrr hevur tikið í líknandi máli. Tað ger ikki støðuna betri, at tað er fútin sjálvur, sum er ákæri í hesum máli.

Hetta kemur í kjalarvørrinum á øðrum russaramáli, har ákæruvaldið gjørdi arrest í russiskum skipi og nú er komið sær út á djúpt vatn, tí eingin loypsn finst í ávísa skipamálinum. Eisini her kundi ákæruvaldið havt avgreitt málið við eini bót og so varð tað tað. Var eisini har talan um eina yvirkriminalisering í eini ivasamari tøku av útlendskum skipi!

**Sosialurin**

## Aftursvar til Sandoyarportalin



**GERHARD LOGNBERG**
løgtingsmaður

Á Sandsportalinum hevur Terji Dalsgaard lagt út: »Sandoyartunnilin verður ikki fyrrenn um 15 ár«.

Hvaðani hevur Terji tað frá. Í síðstu viku svaraði løgmaður mær upp á fyrispurning um Sandoyartunnilin.

Spurningin setti eg fram, tí eg var sera skuffaður av samgonguni, tí P/f Sandoyartunnilin ikki var lýstur, og eingir pengar vóru ásettir. Hetta var einki minni enn eitt bagbit á suðurøkið.

Í millum annað svarar Kaj Leo Johannesen mær soleðis í einum broti:

*»Síðan uppskotið um stovnan av partafelagnum var lagt fyri tingið, er komin í gildið ein løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan, eftir § 22 stk. 2 í lógini kann tað við átegning vera givin heimild til at flyta óbruktar løgujáttanir til seinni fíggjarár. Sostatt hóskar betur at játta til tunnilin beinleiðis á fíggjarlógini eftir nýggju játtanarskipanini, heldur enn umvegis partafelag«.*

Her verður einki sagt um 15 ár, heldur ikki av restini av spurninginum. Spurningur og svar er at síggja á www.logting.fo

Vit eiga øll at standa saman um verkætlanina, sjálvur vil eg gera alt sum stendir í míni makt, at Sandoyartunnilin verður veruleiki.

Eg var uppringdur av einum vágamanni nú ein dagin, eg má siga at maðurin gav mær eina nýggja vón í øllum hann segði millum annað »Gerhard kempa víðari, tí her í Vágunum var arbeiði byrjað, tá tann politiski myndugleikin segði stopp, helst grundað á kreppu. Teir byrjaðu aftur 10 ár seinni. Í dag koyra vit til gleði og gagns fyri Vágar og allar Føroyingar«.

So Terji eg síggi fyri mær ein tunnil áðrenn 15 ár. Eg kundi havt valt at farið úr hesu samgongu og sitið uttanfyri, á tann hátt hevði eg slættað gøturnar soleiðis, at Tjóðveldi kom aftur til makt og søpla restina av peninginum, sum føroyingar eiga. Tá hugsi eg um blokkin.

Niðurskururin av blokkinum hevur kostað føroyingum 3,7 mia tey seinastu 7 árini. Um vit høvdu henda peningin í dag, var eingin kreppa í Føroyum.

Nei lati okkum royna at spjaða vón ímillum fólkið heldur enn at servera tað ringastu armóð.

Tá eg læs greinina á Sandoyarportalinum, var tað sum um tað var eg, sum hevði skrivað hetta, og soleiðis skiltu fólk tað eisini.

Men Gerhard hevði einki við hesa negativu útsagnina at gera.

## Grønlendskir sjúklingar skulu viðgerast í Íslandi ella Danmark

**Grønlendskir sjúklingar fáa nú viðgerð í Íslandi ella í Danmark, og í øðrum førum kemur útlendskur serlækni til Grønlands**

**HEILSUMÁL**
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



Grønlendingar, sum hava bíðað eftir at fáa viðgerð á landsins sjúkrahúsum, fáa núviðgerð uttanlands. Grønlendska heilsuverkið hevur gjørt sáttmála við fleiri sjúkrahús í Danmark og Íslandi, ið skulu viðgera grønlendskar sjúklingar, ið bíða eftir viðgerð. Í løtuni standa 311 fólk á bíðilista til ymsar viðgerðir.

Millum annað hevur heilsuverkið gjørt sáttmála við Arresødal Privathospital í Danmark um at viðgera 100 sjúklingar, sum hava trupulleikar við hoyrnini. Hetta sama sjúkrahúsið skal eisini viðgera 70 grønlendingar, sum skulu hava nýggj knø. Í mai fara 20 fólk til Íslands, har tey skulu til serliga oyrnaviðgerð.

Umframt sáttmálarnar við sjúkrahúsini hevur grønlendska heilsuverkið gjørt sátmála við ein skurðlækna, sum kemur til Grønlands at viðgera 36 fólk, sum hava ymsar liðatrupulleikar. Hann skal arbeiða á sjúkrahúsinum í Ilulissat ta tíðina, hann er í Grønlandi.

Julie Præst Wilche, sum arbeiðir í grønlendska heilsumálaráðnum, sigur við kringvarpið KNR, at sjúkrahúsini í Danmark og Íslandi eru vald út frá góðskukrøvum, men tann fíggjarligi parturin hevur eisini havt týdning, sigur hon.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.